gult26 cyan26 magenta26 svart26

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Indbakke

Frá: Edmund Jacobsen, Esbjerg edmund_jacobsen@hotmail.com **TELDUBRÆVI‹**

Dagur 04.04.01

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

Eysturoyingurin og tann øri hanin

Hettar er ein sonn søga. En søga um eina ólavsøku, i› mundi enda› vi›, at undirrita›i blev bitin í reyvina av einum ó›um hana og saktans kundi veri› handtikin sum innbrotstjóvur.

Men lat okkum heldur byrja frá byrjanini.

Ólavsøkan '94 var sum tær flestu. Eftir tríggjar dagar vi› sera gó›um vertskapi skuldi eg nú ta fjór›a kvøldi› spæla til dans í einari av ítrottarhøllunum í Havn. Ein fínur máti at enda ólavsøkuna uppá.

Eg hev›i fingi› ólavsøku-innivist hjá einum vinmanni, i› bú›i í úja›aranum av Havnini. Dagin eftir hettar seinasta kvøldi›, skuldi eg beinlei›is til Danmarkar, har eg skuldi byrja í journalistpraktikk. Tískil var ta› sera umrá›andi fyri meg, at eg var tí›liga á fótum fyri at náa bussin til flogvøllin.

Eg hev›i pakka› alt vi›føri› hjá mær, og sett ta› inn í kamari›, har eg svav. Alt var sostatt klárt til Danmarkar-fer›ina. Men sum tit óiva vita, so kann alt henda á ólavsøku, og tískil visti eg ikki, um eg kom beinlei›is heim, tá i› eg var li›ugur at spæla. Hev›i hoyrt okkurt um eina veitslu, i› var arrangera› aftaná dansin. So ta› kundi væl ver›a, at eg slettis ikki náddi at koma heim í song á›renn eg skuldi avsta› vi› bussinum.

»Onki problem«, seg›i vinma›urin. »Eg lati hur›ina standa opna, so tú sleppur inn, nær tú so kemur«, lova›i hann á›renn eg fór oman í høllina.

Ná, men kvøldi› gekk væl. Nógv fólk hugna›i sær til dansin í høllini, og h‡rurin var somulei›is sera gó›ur til veitsluna, vit høvdu aftaná dansin. So tá i› eg langt um leingi vendi nøsini heimeftir, mundi klokkan ver›a umlei› hálvgun sjey um morgunin. Og bussurin til flogvøllin koyrdi klokkan átta, so eg hev›i faktisk skund.

Eg bleiv tískil ikki sørt argur, tá i› eg tók í dyrnar hjá vinmanninum. Hur›in var stongd!

Nú vóru gó› rá› d‡r. Tí knappliga mintist eg, at tá i› eg var á veg í ball fyrr á náttini, hev›i eg møtt vinmanninum og konuni, sum vóru á veg heim. Og tey vóru - hvussu skal eg siga ta› - ikki sørt "svimmul" bæ›i tvey. Nú lógu tey óiva og svóvu rúsin av, tí eingin kom út og lasti upp, líkamiki› hvussu eg rópti og banka›i.

Solei›is mundi eg standa í umlei› 15-20 minuttir. So gekk eg eitt sindur runt um húsini fyri at vita, um ikki eitt vindeyga stó› upp á glopp onkusta›ni.

Og so pínadoy› um ikki gluggin í ba›irúminum stó› eitt sindur opin!

Nú halda tit nokk, at allir mínir trupulleikar vóru loystir. Og so langt frá! Tann fyrsti trupulleikin var sjálvur gluggin, i› var so lítil og so høgt uppi á húsasí›uni, at eg neyvan vildi klára at klatra heilt harupp, og sí›ani tro›ka meg inn ímillum allar urtapottarnar og teir smáu keramikfigurarnar.

Tann næsti trupulleikin var nógv torførari, enn tann lítli gluggin. Vinma›urin hev›i nevniliga høsn gangandi í einari gyr›ing vi› húsini. Gyr›ingin var gjørd solei›is, at vesturendin og nor›ursí›an av húsunum vóru innigyrd. Og tá i› tann lítli, opni gluggin var á nor›ursí›uni, so skuldi eg faktisk inn í gyr›ingina fyri at klúgva upp til gluggan.

Nei, nú skula tit ikki flenna! Narkar fáar, tápuligar og bangnar hønir ræ›a ikki ein vælvaksnan eysturoying. Men hanan ræddist eg sum pestin! Hettar var nevniliga ikki nakar vanligur hani, men ein stórur psykopathani!

Vinma›urin hev›i ein dagin á›renn ólavsøku víst mær, hvussu illsintur hanin var. Kom nakar inn í gyr›ingina, so leyp hann á pikkandi og klórandi.

Men klokkan var nú farin av sjey, so okkurt mátti gerast. Eg stó› eina løtu og tók dyrvi til mín. Hanin gekk róligur og stoltur og spáka›i ímillum allar sínar hønur innan fyri gyr›ingina. Stillur sum ein ketta klatra›i eg yvir gyr›ingina, og sníkti meg fram vi› húsasí›uni ímóti tí opna glugganum. Tá i› eg var komin hálva lei›, fekk hanin eyga á meg og kom stórleypandi ímótir mær. Eg mátti faktiskt renna fyri lívinum út úr gyr›ingini. Hanin sá út til at njóta sigur sín. Gekk so spelkin aftur og fram innanfyri, me›an hann hugdi forhánisliga uppá meg.

Nú var ta› vi› at koma panikkur í meg. Klokkan var nú 12 minuttir yvir sjey, og eg mátti gera eitt ella anna›. Annars kom eg ov seint til flogvallarbussin. Eg royndi enn einafer› at banka og rópa, men einki hjálpti. Alt var kvirt og fri›arligt.

Eg leg›i eina n‡ggja strategi. Um eg nú fekk lokka hanan heilt yvir í vestara horni› av gyr›ingini, so kundi eg renna runt um húsini til nor›ursí›una, klúgva yvir gyr›ingina og klatra upp til vindeyga, á›renn hanin náddi at skilja, hvat i› hendi. Jú, hettar var nokk einasti mátin.

So fór eg í gongd. Nú skuldi eg vísa hasum forbrenda beistinum, at eg var klókari enn hann! Í túninum vi› grannahúsini fann eg ein lítlan stiga. Hann stilla›i eg tætt vi› gyr›ingina nor›an fyri húsini hjá vinmanninum. So gekk eg runt um húsini, heilt yvir í vestara horni› á gyr›ingini og lat sum um eg skuldi klúgva uppum hegni›. Og jú, hanin kom rennandi beinanvegin.

Efir at hava øst hanan væl og vir›iliga eina løtu, vendi eg mær knappliga á, rann vi› miklari fer› runt um húsini, fekk fatur á tí lítla stiganum me›an eg rann, sprakk uppum gyr›ingina nor›an fyri húsini, og rann so ímóti tí opna vindeyganum.

Hjarta banka›i vilt íme›an eg setti stigan upp ímóti húsaveggjinum. Út ígjøgnum eygnakrókarnar sá eg hanan koma vi› fullari fer› runt um húsahorni›. Stigin var gamal og rotin og braka›i undir vektini, tá i› eg steig upp á fyrsta trini›. Hanin var næstan hjá stiganum, tá i› eitt av trinunum brotna›i!

Eg skríggja›i av angist! Adrenalini pumpa›i í kroppinum! Hjáááálp!!!

Ta› var næstan eitt undur, at eg fekk fatur á vindeygakarminum just sum hanin var vi› at leypa á. Vi› mínum seinastu kreftum fekk eg syft meg upp, og fór so eftir høvdinum inn ígjøgnum ta› tronga vindeyga›, so urtapottar og smáir keramikfigurar fuku í allar ættir.

Eg lá eina løtu á ba›irúmsgólvinum, íme›an pulsurin kom ni›ur ímóti tí normala. Sí›ani fór eg inn í kamari› og tók vi›føri›, og ringdi eftir einum h‡ruvogni. Eg hoyrdi ógvusligt snork úr sovikamarinum hjá vinmanninum og konuni íme›an eg lat úthur›ina upp og steig út í morgunluftina.

Og íme›an eg bí›a›i eftir h‡rivogninum hoyrdi eg ein hana gala. Solei›is enda›i hendan ólavsøkan.

KRISTIN KYKMYND. Í USA eru tey farin at gera kristnan film. Ta› byrja›i vi› Omega Code og nú er ta› Left Behind, i› alt, i› er kristi›, vil síggja

Tikin ella latin eftir

FILMUR

Birgir Kruse

Undir sólini er einki n‡tt. Solei›is sigur Prædikarin. Men neyvan mundi hann vita, at kristi fólk kundi lokkast í biograf. Í Gu›s egna landi, USA, hava tey varnast ein tiltakandi áhuga fyri filmum, sum hava eitt sonevnt kristiligt innihald.

Hetta eru filmar, sum aloftast hava eitt apokalytiskt innihald. Teir vilja minna okkum á heimsins enda og lívi› eftir dey›an. Hesar morbidu opinberingar hava lokka› hópin av fólki í biograf. Fyrst vi› filminum "Omega Code", i› fyrraári› var› markna›arførdur sum "filmurin, i› rysti Hollywood".

Nú er apokalyptiska biografevni› tiki› upp av n‡ggjum í filminum "Left Behind", sum kom á video í fjør, men var› frums‡ndur í amerikansku biohallunum 2. februar.

"Left Behind" er eitt heiti, sum far meg at minnast á barnabókina "Tikin ella latin eftir", sum kom á føroyskum í t‡›ing hjá Victori Danielsen í 1947. Hugsi, at Ingálvar av Reyni tekna›i kápumyndina.

Til innihalds byggir hesi n‡ggi samnevndi filmurin á Opinberingsbókina og var› longu innan frums‡ning í biohallunum, seldur í hálvari tri›u millión video-eintøkum. Ein klár ábending um ein n‡ggjan markna›, eingin visti var til. So nú er eitt n‡tt slag av filmi fostra›. Ikki er ta› vist, at hetta slagi› fer at skriva seg inn í fremstu sí›u í filmsins bók.

Søgan í n‡ggja filminum "Left Behind" er í stuttum tann, at ein russiskur ST-a›alskrivari, sum í veruleikanum er Antikrist, vil leggja Heimin undir seg. Tey rættrúgvandi ver›a sí›ani tikin til Himmals, me›an tey, i› latin ver›a eftir, mugu lí›a í sjey ill ár.

Ta› er sjáldsamt, at ein kristin biograffilmur ver›ur sendur í umfar í amerikanskum biografum. Heili 900 eintøk av filminum "Left Behind" eru send í ringrás og hann gongur enn fyri fullum húsum, har í landinum. Sigst, at ein herfer› vi› telduposti, vend móti filmsútleigarum, elvdi til stóra tali› á filmum og at allar dyr tá vór›u latnar upp fyri honum. Framman undan var› søgan kend í samnevndari bók.

Á heimasí›uni hjá The Internet Movie Data Base www.imdb.com ber til at lesa og kjakast um filmin "Left Behind".

Í kjalarvørrinum av amerikanska forsetavalinum vór›u røddir frammi um, at tey illavornu í Hollywood og ø›rum syndafullum stø›um, nú mugu taka anna› skinn um bak. Bæ›i George Bush og Al Gore hava prædika› ein n‡ggjan kristnan moral, eina kristna n‡moralismu, sum hevur fingi› gó›a undirtøku, serliga tá umræ›ur har›skap á filmi.

Nú er so ein n‡ggjur filmsvøllur strika›ur av. Ein vøllur, sum telur kristi fólk, i› eigur pengar og vil síggja film. Uttan har›skap, men apokalyptiskur. Spennandi, hvat ta› førir til.

gult27 cyan27 magenta27 svart27

Mentamálast‡ri›

Lærarar
at undirvísa deyvum- og/ella hoyribreka›um

Leys at søkja eru 2 lærarastørv og 1 vikarstarv – í mestan mun at undirvísa deyvum- og/ella hoyribreka›um børnum frá 1. august 2001 – fyribils á venjingarskúlanum og/ella í Sernámsdeplinum. Eftir umstø›unum mugu tey, i› sett ver›a, eisini vilja átaka sær a›ra undirvísing. Eftir tørvi skipar Sernámsdepilin fyri førleikaskei›um, harí teknmálsskei›um fyri lærarar og onnur, i› eru um tey deyvu. Tey, i› sett ver›a, mugu vilja luttaka í hesum arbei›i, bæ›i sum næmingar og sí›an sum undirvísarar.

Førleikakrøv
- Lærarautbúgving
- Gó› samstarvsevni
- Førleika at arbei›a sjálvstø›ugt
- Fyrimun hava umsøkjarar, i› kunnu undirvísa í – og á teknmáli, me›an onnur áhuga› kunnu eisini søkja størvini – írokna› lærara-lesandi, i› fáa prógv í summar.

Umsøkjarar, i› ikki hava teknmálskunnleika, mugu vilja luttaka á skei›i longu í vár.

Setanar- og lønartreytir:
Størvini ver›a sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálast‡ri› og Føroya Lærarafelag.

Umsóknir
Umsóknir vi› prógvum o.ø. skulu sendast til:

Sernámsdepilin
Á Frælsinum 32
Postrúm 2036
FO-165 Argir

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. apríl 2001.

Fleiri uppl‡singar fáast vi› at venda sær til Hans Eli Dahl í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

ESVAGT-THOR

Spennandi størv innan frálandavinnu

Skiparar/st‡rimenn, maskinmenn, kokkar og dekkarar.

Størvini:
Eru í høv›usheitum umbor› á standby skipum.

Krøv og ábyrgd:
Starvsfólki› fær ábyrgd av, at formligu reglurnar á økinum ver›a fylgdar, og at arbei›sgongdir eru í trá› vi› málsetning virkisins.
Starvsfólki› skal til eina og hvørja tí› kunna ver›a flutt umbor› á onnur skip hjá A/S ESVAGT ella P/F THOR.

Førleikakrøv:
Skiparar/st‡rimenn:
- Vinnubræv sum skipsførarar/skiparar vi› STCW átekning II/2
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskei›, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkilei›araskei›
- GMDSS skei›
- ARPA skei›
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 Gó›skust‡ring (fyrimunur, tó eingin treyt)
- Væl fyri í enskum, bæ›i í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri
- Kunnleika til D.P útger› (fyrimunur, tó eingin treyt)

Maskinmenn:
- Vinnubræv sum maskinmeistarar vi› STCW átekning III/2
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskei›, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkilei›araskei›
- Væl fyri í enskum, bæ›i í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

Kokkar:
- Vinnubræv sum skipskokkar
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskei›, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkiskei›
- Væl fyri í enskum, bæ›i í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

Dekkara:
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskei›, ikki eldri enn 5 ár
- Væl fyri í enskum, bæ›i í skrift og talu
- Fysiskt væl fyri

Løn og setanartreytir:
Ver›a ásettar eftir avtalu.

Umsóknir:
Umsóknir vi› avritum av prógvum og møguligum vi›mælum skulu sendast til **P/F THOR, 420 Hósvík,** í seinasta lagi 14.04.2001.
Nærri uppl‡singar fáast, vi› at venda sær til **Gunnbjørn Joensen**, tlf. 42 25 03.

P/F ESVAGT-THOR er eitt felag, sum í høvu›sheitum arbei›ir innan oljuvinnuna, herundir trygd og umhvørvisvernd. Meira sæst á heimasí›u okkara www.thor.fo



REYNI-SERVICE

Bilur vi› ska›a til sølu

Til sølu er Ein Toyota Corolla 1.4 sedan 4 hur›ar. Bilurin hevur ska›a framman og ver›ur seldur fyri hægsta bo› yvir 60.000,- kr. sum hann stendur vi› ska›a.

Skrásettur fyrstu fer› 27.03.2000
Km. 21.000

P/F Reyni Service
Bilasølan
tlf. 313040

Pedagogur
til frítí›aransingina í Runavíkar Kommunu

Søkt ver›ur eftir pedagogi at arbei›a 30 tímar um vikuna í frítí›aransingini í Runavíkar Kommunu.
Frítí›aransingin, sum er skipa› undir Kommunalu Barnaansingini, er normera› til 30 børn.

Vit ynskja at tú ert kreativ/ur, hevur gó› samstarvsevnir og hevur hug at arbei›a vi› børnum.

Starvi› ver›ur at seta skjótast tilber, ella eftir nærri avtalu.

Nærri uppl‡singar starvinum vi›víkjandi fáast frá lei›aranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunalu Barnaansingi í hendi í seinasta lagi 20/04-2001.



Kommunala Barnaansingin
Hei›avegur
600 Saltangará

Hvíldarheimi› NAINA

søkir eftir

hjálparfólki

Vit sóknast eftir einari búnari kvinnu vi› gó›um samstarvsevnum og sum er álítandi, reinfør, blí› av lyndi og dugir væl at umgangast fólk.

Arbei›stí›in er uml. 1/2 tí›.

Meira fæst at vita vi› at ringja til fyristø›ukvinnuna.

Vit ynskja sum skjótast skrivliga umsókn vi› uppl‡singum um persónlig vi›urskifti so sum aldur, fyrrverandi arbei›i og møgulig vi›mæli.

Fyristø›ukvinnan
Hvíldarheimi› NAINA
Tlf. 311840

veitst tú ikki tað?
Sosialurin